# Skrokktrygging fyri maskinur og útbúnað

**Hjá okkum kanst tú velja ta trygging, ið hóskar til tín tørv, tína maskinu og tín útbúnað.**

Tú kanst tekna eina skrokktrygging við ískoytum.

**Skrokktrygging**
Skrokktryggingin fevnir um:

**Skrokktrygging**
Endurgjald fyri skrokkskaðar, ið koma á sjálva maskinuna og útbúnaðin. Tryggingin fevnir um skaðar av øllum slag, sum ikki eru undantiknir í treytunum. Hon fevnir tó ikki um skaða, sum bert kemur á mekaniskar og elektriskar lutir.

**Nývirðisendurgjald**
Nývirðisendurgjald er, at tú kanst keypa tær spildurnýggja maskinu og útbúnað, um tryggjaðu lutirnir fáa stóran skaða. Er bert galdandi fyri maskinur og útbúnað, ið eru eitt ár ella yngri. Kostnaðurin fyri umvæling skal vera hægri enn 50% av nývirðinum. Tryggjaðu lutirnir skulu vera verksmiðjunýggir, tá tryggingin verður teknað.

**Lyklafulnað**
Tryggingin veitir endurgjald, tá lykil til tryggjaða akfarið verður stolin ella mistur.

**Rættarhjálp**
Rættarhjálp er fíggjarligur stuðul til sakførarahjálp.

**Ískoytistryggingar**
Er skrokktrygging teknað, kunnu niðanfyri nevndu ískoytis-tryggingar teknast.

**Mekaniskur skaði**
Trygging kann teknast fyri skaða á mekaniskar og elektriskar lutir.

**Fíggjarmiss**
Um tú hevur inntøku við tínum bili, kann trygging teknast fyri fíggjarmissin tú hevur, meðan akfarið er á verkstað vegna skaða, ið skrokktryggingin fevnir um.

**Hvussu verður tryggingin teknað**
Tryggingin verður teknað hjá Betri Trygging.

**Fá meira at vita**
Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600, og fáa nærri vegleiðing frá einum av okkara ráðgevum.

Betri Trygging
Yviri við Strond 2
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn
Tel 348 600

trygging@betri.fo
www.betri.fo